## TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um Ísak og Rebekku (1. Mós. 24). Ein hin vakrasta myndin av Kristusi og samkomuni. www.hebron.fo

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 20 Sangvenjing.
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Siloakórið luttekur. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Týsdagin Hornvenjing.
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 17.30 Títtlingasangur, kl. 18.30 Barnaøddir venja, kl. 19.30 Menn samlast.
Hósdagin Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Sunnudagin kl. 11 Møti, familjutímin byrjar við drekkamunni aftaná flaggdagsskrúðgonguna kl. 16. Skótarnir skipa fyri.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær. Vak og bið«!

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Katekismus.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagur kl. 9.30-12 Foreldur og børn hittast.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti v/ Jákubinu og Kim Hansson.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Týsdagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20 Felags húsbólkamøti.
Leygarkvøldið Opið hús kl. 21 við Símun Absalonsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Evangel. møti kl. 19. Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti. Vælkomin í Betania.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Frelsunarherurin í Vági**
Í kvøld kl. 20 Heimaforbundið.
Onskvøldið kl. 19 Juniorsoldátamøti.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbygg. fundur.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 19. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl
**Enn eru nøkur pláss eftir til Norratúrin 2.-10. aug. saman við sandoyingum. Tilmeld. 316491**
***Týsdagur 20. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásøgn, Jákup Lindenskov
***Mikudagur 21. apríl***
kl. 10-12 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson.
kl. 15 Vitja framsýningina í Lítluvík
***Hósdagur 22. apríl***
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14 Fundur fyri pensioneraðum sjúkrasystrum
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 23. apríl***
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14-17 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin19. apríl***
Vit seyma teppuni liðug. Upplestur.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 19. apríl***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 20. apríl***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 21. apríl***
Hugnaløta v/ Mejnhardt og Judith
***Hósdagin 22. apríl***
Prát og sangur
***Fríggjadagin 23. apríl***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing
.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**V4-dráttur**
**í drátti nr. 1533**
**17. apríl 2004**

**Tølini:** 4 - 15 - 16 - 19 - 22 - 23 - 30 - 42 - 46 - 61 - 73 - 77 - 89 - 90 - 96 - 97

**Ein vinnari**
Snars. nr. 2711472, Argir

**Eykavinningar**
**Apex ferðaseðil**
Snars. nr. 2811048, Klaksvík
Snars. nr. 2826153, Klaksvík
Vanl. seðil nr. 335113, Tórshavn

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum


Móttøka
í samband við fyrsta skotið Borðoyarmegin

Fyrsta skotið fyri Norðoyatunlinum borðoyarmegin verður:
týsdagin 20. apríl kl. 15.00

- almen móttøka verður í høllini á arbeiðsplássinum við Borðoyarvík aftaná.





NORÐOYATUNNILIN
Norðoyatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postsmoga 1010 · 110 Tórshavn
Tel 350200 · Faks 350201 · www.tunnil.fo
www.sansir.fo



HÖRMANN
Portur til vinnu og privat
Portur og el-opnarar til bilhús
Hörmann Uppfyllir øll trygdarkrøv vísandi til DS/EN 12604





Er kostnaður av størri týdningi enn góðska? Hörmann hevur alt
Alt innan hurðar og portur
MALLCO
HÖRMANN
Telefon: 45 79 77 · Mobil: 22 04 46 · e-mail: mallco@post.olivant.fo
Sosialurin




# Landið má hjálpa Tórshavnar Kommunu við trupulleikanum

**Tað er ikki bara Tórshavnar kommuna, sum hevur ábyrgdina av at finna nýggja Smyrli fast atløguupláss í Havnini og tí má landið hjálpa til, heldur løgmaður**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN


*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


– Tað er ikki bara Tórshavnar Kommuna, sum hevur ábyrgdina av at nýggi Smyril fær fast atløguupláss í Havnini.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Beint fyri páskir var hann á fundi við Havnameistaran hjá Tórshavnar Kommunu um atløguviðurskiftini hjá nyggja Smyrli í Havn.

– Hetta var ein kunnandi fundur, sum havnameistarin hevði biðið um, sigur Løgmaður.

Hann sigur, at á fundinum legði havnameistarin síni sjónarmið fram, men at ongin avgerð varð tikin.

Jóannes Eidesgaard sigur, at Vinnumálaráðið er í støðugum sambandi við Tórshavnar Havn um atløguviðurskiftini hjá nýggja Smyrli.

Men í øllum førum kann staðfestast, at ætlanin hjá Tórshavnar Kommunu um at gera ferjlulegu til nýggja Smyril inni á Bursatanga, uttan á Norrønu, hongur í einum klønum trái.

Í fyrstu atløgu liggur í kortunum, at landsstýrið fer at taka undir við einum tilmæli frá Fornminnanevndini um at økisfriða Tinganes heilt út á 10 metra dýpið. Hendir tað, er ætlanin deyðadømd í føðingini, tí ein frotreyt fyri at gera atløguupláss til nýggja Smyril inni á Bursatanga, er júst, at tað verður loyvt at dýpa framvið Tinganesi.

### Vánaligt undir øllum umstøðum

Men løgmaður er sannførdur um, at hóast loyvi verður givið til at dýpa framvið Tinganesi, er tað kortini ein vánalig loysn at gera atløguupláss til nýggja Smyril inni á Bursatanga.

– Eisini Landsverkfrøðingurin, sum er ovasti, teknisk ráðgevarin hjá landsinum, heldur, at hetta er ein vánalig loysn, tí har er ov trongt og tað fæst ov lítið fyri tað, sum útbyggingin kostar.



*– Tórshavnar Kommuna hevur staðið rættiliga einsamøll við trupulleikunum og tað haldi eg ikki vera rætt, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

Eitt nú verður víst á, at Norrøna kann ikki koma at bryggju, tá ið Smyril liggur við bryggju frammanundan.

Men løgmaður sigur eisini, at tað er sjón fyri søgn, at Norrøna er ov stór til Tórshavnar Havn.

– Har er so lítið at geva av, at tann, sum leggur Norrønu at í Havn, skal sanniliga ikki ristast á hondunum.

– Og umframt plásstrot, krevur tað eisini, at skiparin hevur natúruna við sær, so hatta er langt frá ein góð loysn, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Sostatt er tað bara ikki friðingarspurningurin, sum forðar fyri, at Smyril fær nýtt atløguupláss inni á Bursatanga.

### Eisini ábyrgd hjá landinum

Løgmaður metir kortini ikki, at hetta er ein trupulleiki, sum Tórshavnar Havn eigur einsamøll.

– Landið hevur lagt nógva orku í at fáa nýggja Smyril. Vit hava sett stóran motor í hann so at hann kann sigla.

Hann leggur afturat, at landið hevur somuleiðis gjørt nýggja havn til Smyril fyri yvir 60 milliónir í Trongisvági.

– Hetta er sanniliga eisini ein trupulleiki hjá landsmyndugleikanum, serliga tá ið hugsað verður um, at vit gera havn í Trongisvági.

Hann sigur, at tað er ikki annað enn natúrligt, at landsmyndugleikarnir eisini hevur áhuga í at loysa atløgutrupulleikarnar í høvuðsstaðnum.

Og hann dylir heldur ikki fyri, at nýggi Smyril heilt avgjørt eigur at hava atløguupláss í sjálvum høvuðsstaðnum.

Sostatt vísir hann aftur alt tos um at lata nýggja Smyril siga á Gomlu Rætt, á Sund, til Kollafjarðar ella onnur støð, sum eru nevnd.

– Høvuðsstaðurin og Smyril eru óloysiliga knýtt saman. Smyril hevur siglt til Havnar í yvir 100 ár og tað er ein skylda hjá høvuðsstaðnum at taka ímóti allari strandfaraskipunum.

Løgmaður leggur kortini afturat, at hetta er ikki ein trupulleiki, sum eigur at hvíla á Tórshavnar Kommunu einsamallari.

– Eg fari at geva borgarstjóranum í Havn rætt í, at tað er ikki bara ábyrgdin hjá Tórshavnar Kommunu at syrgja fyri, at nýggi Smyril fær atløguupláss í Havnini. Tað er líka nógv ein trupulleiki hjá landsmyndugleikunum.

Tórshavnar Kommuna hevur lagt stóran dent á inntøkurnar, sum Tórshavnar Havn hevur av Skipafelagnum og Smyril Line.

– Á fundinum við Tórshavnar Havn beint fyri páskir vísti eg á, at bæði Kollafjørður og Sund eru í Tórshavnar Kommunu, so inntøkurnar minka hjá kommununi minka ikki eitt oyra, hóast skipaferðslan verður spjødd eitt sindur runt um í kommununi.

– Hinvegin mugu vit staðfesta, at higartil hevur Tórshavnar Kommuna staðið rættiliga einsamøll í spurninginum um atløguupláss til nýggja Smyril og tað haldi eg ikki er rætt.

Men, hvussu farast skal fram, hevur hann ikki nakað boð uppá í løtuni

Hann heldur, at ein møguleiki er, at Landskassin yvirtekur atløguplássið hjá Norrønu til nýggja Smyril og at nýggj Havn til Norrønu verður bygt onkra aðrastaðni.

– Hetta er sjálvsagt ein loysn, sum liggur nakað frammi í tíðini.

Hvat skal gerast beinanvegin fyri at hava pláss klárt til Smyril, veit hann ikki. Ein møguleiki kundi verið at gjørt ein ferjuskráa í krókinum undir Skipafelganum, men um tað ber til, veit hann ikki.

Hinvegin veit hann, at trupulleikin verður ikki lætttari at loysa við tað, at nýggj krøv verða sett í gildi nú, har meginparturin av havnalagnum í Havn verður gyrt inni.



**TIPS 13 úrslit**
**Vika 16 – 17. apríl**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | OB–Esbjerg | X |
| 2. | Blackburn–Leicester | 1 |
| 3. | Bolton–Tottenham | 1 |
| 4. | Charlton–Birmingham | X |
| 5. | Chelsea–Everton | X |
| 6. | Liverpool–Fulham | X |
| 7. | Manchester C–Southampt. | 2 |
| 8. | Wolverhampt.–Middlesbr. | 1 |
| 9. | Gillingham–Ipswich | 2 |
| 10. | Norwich–Walsall | 1 |
| 11. | Nottingham F–Millwall | X |
| 12. | Rotherham–Watford | X |
| 13. | West Ham–Coventry | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | 363.386,- kr. |
| 12 røtt: | 3.700,- kr. |
| 11 røtt: | 306,- kr. |
| 10 røtt: | 56,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**TIPS 12 úrslit**
**Vika 16 – 18. apríl**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AB–FC København | 2 |
| 2. | AGF–FC Nordsjælland | 2 |
| 3. | Brøndby–AaB | 1 |
| 4. | Frem–FC Midtjylland | 1 |
| 5. | Viborg–Herfølge | 1 |
| 6. | FC Fredericia–Vejle | X |
| 7. | Horsens–B 93 | X |
| 8. | Køge–Randers FC | 2 |
| 9. | Silkeborg–FC Nordjylland | 1 |
| 10. | Sønderjy. E–Nykøbing F All | 1 |
| 11. | Ølstykke–Brønshøj | 1 |
| 12. | Holbæk–Lyngby | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | 44.527,- kr. |
| 11 røtt: | 961,- kr. |
| 10 røtt: | 92,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum


**HAVNAR BIO**
Tlf. 311956
www.bio.fo




Týsdagin 20.04. kl. 20⁰⁰ Týsdagin 20.04. kl. 22¹⁵
Mikudagin 21.04. kl. 20⁰⁰ Mikudagin 21.04. kl. 22¹⁵
Hósdagin 22.04. kl. 20⁰⁰ Hósdagin 22.04. kl. 22¹⁵




Týsdagin 20.04. kl. 19³⁰ Mikudagin 21.04. kl. 19³⁰
Hósdagin 22.04. kl. 19³⁰




Týsdagin 20.04. kl. 22⁰⁰ Mikudagin 21.04. kl. 22⁰⁰
Hósdagin 22.04. kl. 22⁰⁰ – *Seinasta sýning*




Týsdagin 20.04. kl. 17³⁰ Mikudagin 21.04. kl. 17³⁰
Hósdagin 22.04. kl. 17³⁰




Týsdagin 20.04. kl. 17¹⁵ Mikudagin 21.04. kl. 17¹⁵
Hósdagin 22.04. kl. 17¹⁵ – *Seinasta sýning*

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**